tíðindablaðið sosialurin

Telefon 118 20
Argjavegur 26, 3800 Argir
Postsmoga 76, 3800 Tórshavn

Útgávudagar: týsdag, hósdag og leygardag

Lýsingar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi kl. 10 dagin fyri útgávudagin

Útgevari:
P/f Sosialurin
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller
Fyritaksstjóri:
Krisjan Dahl
Blaðfólk:
Høgni Djurhuus
Randi Jacobsen
Dagny Joensen
Uppseting:
P/f Sosialurin
Prent:
P/f Pressan 1981

»Sermerkt postkort«

Viðmerking

Visandi til ummæli í blaðnum hósdagin 29. august verður vist á, at í fleiri ár — 15-20 ár, møguliga fleiri enn so — hava føroysk listafólk givið út postkort av listaverkum — teknningum, málningum og pappírsklippum, hetta er als einki nýtt.

Skal talan vera um nakað nýtt, kann tað bert vera at stilurin er ein annar og at listamaðurin er útlendingur.

Tað er harmiligt at eitt blað kemur við skeivum upplýsingum og átti tað eisini at verið harmiligt fyri blaðfólk.

Rannveig G. Isfeldt

—

At áðurnevndu postkort als einki nýtt hava við sær, haldi eg vera løgið, av tí at tey ikki hava verið á prenti áður.

Tí dugi eg ikki at skilja at skriving min er »skeiv upplýsing« ella at tað er »harmiligt« at eg sum blaðfólk havi fört hetta fram.

Tað veldst um persónliga uppfatan, og her fari eg sjálvsagt ikki at krevja, at øll hava somu uppfatan sum eg.

Her er tað listaverkið sum telur, — ikki hvat hvør er ella hvaðani listamaður er ættaður.

Dagny

tjak og meiningar

Vit gera lesarar okkara varugar við, at treytin fyri at fáa lesarabrøv upptikin undir hesum teiginum er, at blaðstjórnin veit, hvør hevur skrivað brøvini.

Jødahatur og ÓBDB

oddagrein

TAÐ er einki nýtt, at málgagnið hjá Fólkaflokkinum, Dagblaðið, leggur javnaðarfólk undir jødahatur og nú og tá roynt at finna fram »prógv« fyri hesum pástandi. Tað er ikki okkara ætlan at byrja orðaskifti við ÓBDB um ein slíkan spurning, tá slíkt tjak b[illegible] tykist hava eittans endamál: at r[illegible]gja veruleikan og brúka alskyns k[illegible]stur til tess at røkka sínum egna einoygda politiska endamáli, sum er at kvøa og jarðleggja allar aðrar politiskar hugsanir og rørslur, sum annars áttu at havt so náttúrligt innivist í einum frælsum og demokratiskum samfelag, sum vit siga land okkara vera.

ÓBDB hevur nú á ein áhugaverdan hátt »prógvað« at tað eru »sosialistar«, sum eru orsøkin til alt jødahatur og allan yvirgang móti jødum, sum vit hava verið vitni til gjøgnum søgu mannaættarinnar. Á heilari blaðsíðu tann 21. august fáa vit at vita, hvussu ymsir »sosialistar« hava elvt til hatur móti jødum.

MILLUM Hesar »sosialistar« er Adolf Hitler, og ein nýggjur táttur í hesum virksemi ÓBDB's er at gera Hitler til »sosialist«, so at sosialisman eisini kann fáa ábyrgdina av teimum illgerðum, hann framdi. Ja, slíkir eru menn, sum siga seg verja okkara demokratisku skipan og siga seg virða hvønn annan. »Prógvið« fyri hesum pástandi er, at Hitler kallaði seg national»sosialist« og fæst uttan iva onkur at trúgva hesum, verður tað endurtikið nóg ofta. Kortini hava vit so mikið av virðing fyri føroyinginum, at vit halda, at hann langt síðani er raknaður við og funnið fram til, hvønn óhugnaligan framferðarhátt ÓBDB brúkar fyri at røkka sínum politisku málum.

ØLL vita, at hesir pástandi eru ein rangsnúgvan av veruleikanum, men fyri at eisini lesarar av ÓBDB skulu skilja hetta, skal her verða endurtikið tað, sum Gyldendal Leksikon sigur um »sosialismuna« hjá nasistunum: »Oprindeligt fremførtes en yderst uklar økonomisk teori om antikapitalisme, men nazismens såkaldt socialistiske indslag trængtes hurtigt i baggrunden«. Sagt verður eisini, at Hitler kom til valdið »støttet af indflydelsesrige, storindustrielle kapitalkredse . . .«

SÍÐAN kann ein undrast á, at tá Hitler nú skal gerast til sosialist, hví nýtir ÓBDB so bert 6 stuttar reglur uppá teir ræðuleikar, sum Hitler framdi móti jødunum, og sum jú yvirgongur alt annað, sum jødarnir hava verið fyri gjøgnum tíðirnar?

AT jødarnir vóru nærum týndir, vita vit øll, men tað eru ikki øll, sum eru greið yvir, at undan hesi týning framdu nasistarnir eina rasulóggávu, sum gjørdi jødarnar mestsum rættarleysar. Samb. Nürnberglógunum frá 1933 til 1935 mistu jødarnir statsborgaraskapin og rættin til at reka ávísar vinnur, at gifta seg við ariarum o. s. fr.

HETTA man vera fyrstu ferð, at eitt land við lóg hevur gjørt ein bólk av sínum borgarum til annan floks borgarar. Men hetta verður als ikki nevnt í hesi grein. Hetta hevur kanska sína frágreiðing. Vit vita um eitt annað land, sum við lóg hevur gjørt enntá størsta partin av borgarunum rættarleysar í mun til »harrafólkið«. Hetta land er Suðurafrika, hvørs lóggáva móti svørtum kundi verið ein avskrift av týsku jødalógunum. Hetta er ein skipan, sum verður fordømd um allan heim av sovæl vistra- sum høgraflokkum. Men henda stjórnin hevur ein verja, sum nýtir eitthvørt høvi til at bera í bøtuflaka fyri viðurskiftunum í hesum landi, og hesin verjin er ÓBDB.

SO tað er kanska ikki so løgið kortini, at Hitler bert fær seks reglur í nevndu grein, tá hann jú nýtti somu mannagongd móti jødum, sum stjórnin í Suðurafrika nýtir móti teimum svørtu. Sama stjórn hvørs hollasti stuðul í heiminum er júst ÓBDB.

HITLER Jagstraði jødarnar og sosialistarnar. ÓBDB jagstrar eisini sosialistarnar. Og tað, sum er so undrunnarvert, er, at sami ÓBDB tekur undir við tí rasuskilnaðarpolitikki, sum verður førdur í Suðurafrika og sum minnir ikki sørt um júst sama politikk, sum Hitler rak ímóti jødunum.

TOSA vit um menniskju og tað gera vit, tá kunnu vit spyrja: hvør er tað, sum hatar, og hvør er tað, sum setir demokratisku skipan okkara til viks. Svarið kennir eftirhondini hvørt mansbarn í Føroyum: ÓBDB, sum er høvuðsmálgagn Fólkafloksins.

jamü

Hyklaríið í hæddini

»Við tí stóra meirluta Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava í sitandi samgongu, kundu teir bert tikið undir við uppskoti Fólkafloksins í vár um at steðga vatnorkuprojektinum við Eiðisvatn . .«



Soleiðis tekur Åge Ellefsen til orða í Dagblaðnum 30. august. Við hesum orðum má hyklarí fólkafloksins um Eiðisvatn vera komið í hæddina og tí má tað verða neyðugt einaferð enn at minna á fólkafloksins leiklut í vatnorkumálinum.

Fyrst er at minna Åge Ellefsen og aðrar fólkafloksmenn — eitt nú Jógvan í Løduni, á, at tað var ikki fólkaflokkurin, men undirritaði, sum reisti spurningin um Veðranesprojektið á løgtingi. Síðan er at minna hann á at tá hetta mál hevði ligið í tinginum í longri tíð og hevur verið til fyrstu viðgerð, komu triggir fólkafloksmenn við einum líknandi uppskoti. Hetta eins og alt Veðranesmálið á tingi varð væl og virðiliga jarðað í umhvørvisnevndini, har fólkaflokkurin átti formannin — alt meðan stavnamaðurin á pallinum í Sjónleikarhúsinum fyri opnari mikrofon hátiðarliga svór, at hann skuldi § 13-blokera øll mál í samgonguni til Eiðisvatn var vorðið bjargað.

Síðani hendi tað, at samgongan samtykti og avgreiddi ein hóp av málum fram til valið tann 7. november 1984 uttan nakra blokering.

Eitt tað mest týdningarmikla av hesum málum var **at geva SEV loyvi til at fara í holt við týningarverkið norðuri við Eiðisvatn!** Åge Ellefsen og aðrir tykjast at hava gloymt, at fólkaflokkurin sat í hesari somu samgongu og **hevði allar møguleikar til at forða hesum loyvi** við tiltiknu grein trettan, sum annars var dúgliga í brúki undir borgarligu samgonguni.

Síðan til »uppskot fólkafloksins í vár«. Hvat var hetta fyri eitt uppskot? Hetta var eitt uppskot av sama slag sum eitt longu frammanundan samtykt uppskot: nevnliga ein **áheitan** til SEV. Tá vit sóu hvussu SEV virdi **ta** fyrru áheitanina, so vita vit eisini hvussu SEV hevði mett eina nýggja áheitan!

Hetta uppskot fólkafloksins í vár var einki uttan ein sjónleikur fyri Føroya fólki júst sum upptraðkan stavnamansins á leikpalli Sjónleikarahúsins á vári í 1984 (Her má tað tó fyri rættvísis sakir viðgangast, at Oli riggaði betur í klovnarolluni, enn Åge riggar í rolluni sum forargaður og vónbrotin umhvørvisaktivistur!)

Afturat er so at minna Åge Ellefsen á, at í vár var bert ein einasti møguleiki at steðga vandalunum í SEV og tað var við løgtingslóg. Hesari løgtingslóg atkvøddu hvørki Åge Ellefsen ella nakar annar fólkafloksmaður fyri. Teir hvørki vildu ella tordu! Vildu ikki av umhugsni fyri vandalunum — tordu ikki fyri tí multinationalu stórfyritøkuni Højgaard & Schultz og hennara føroysku skutilsveinum!

At enda harmast Åge Ellefsen um, at tey vinstrahallu ráða í øllum føroyskum felagsskapum. Tað er møguligt og gævi tað var so væl!

Men tað er í hvussu so er ein felagsskapur har tey vinstrahallu ikki ráða. Hesin felagsskapur er SEV. Sambært oddagrein í Dagblaðnum fyri stuttum eigur fólkaflokkurin avgjørdan meirluta í SEV-stýrinum. Sostatt skuldi Eiðisvatn hvørki skapt Åge Ellefsen høvuðbrýggj ella sálarkvøl, tí er fólkaflokkurin tann umhvørvisflokkur, sum hesin sami Åge Ellefsen vil vera við, so kunnu fólkafloksbossarnir í SEV jú bert í rørandi semju við Åge, Óla, Jógvan og aðrar umhvørvisvinir steðga bábelsku ørskuni við Eiðisvatn og flyta vatnorkuútbyggingina suður á Veðranes — ella uppaftur betur, heilt halda uppat við slíkum óðamannaverki.

Jóannes Dalsgaard